# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Fimmbogi við hægstu kavaraútbúgving



*Fimmbogi fær Divemaster-prógvið. Høgrumegin: Fimmbogi M. Poulsen, Hvannasund, Divemaster, og vinstrumegin Janus Joensen, kavara-Instruktør, Klaksvík*

**15.juni tók Fimmbogi M. Poulsen prógv sum PADI-Divemaster hjá kavaraskúlanum Faroe Dive í Klaksvík**

KAVING

Divemaster útbúgvingin er ein av teimum hægstu og mest krevjandi kavaraútbúgvingunum, ein kann taka her á landi.

Hann hevur við hesum prógvi, sum kavaraleiðari, fingið kunnleika og myndugleika at standa fyri túrum og virksemi í samband við kaving, hjá kavarum ið hava kavaraprógv.

Fimmbogi hevur ætlanir at virka innan ferðavinnuna við vitan síni innan kaving, og harvið gera Føroyar til eitt enn meir áhugavert stað hjá ferðafólki at vitja.

## Nøkur fátøk orð Jógvan hjá Bedingsmeistaranum til minnis



Sum ein eldist lurtar tú kanska heldur betur eftir andlátum í útvarpinum og kvakk eg við, tá ið eg hoyrdi, at Jógvan var farin.

Jógvan og eg komu at kennast, tá ið vit komu at sigla saman við M/S Ice Star hjá Copenhagen Reefers - hann sum yvirstýrimaður og eg sum skipari, og má eg siga, at tað varð ein sonn frøði at sigla saman við honum. Vit sigldu nógv uppá Grønland fyri KGH og vóru tað mangir buldrasligir túrar, men sum sjómanni so líkt, gloymir tú skjótt tær ringu løturnar í ísi og illveðri og skerum í bæði borð, men tá var tað ein sannur fongur at hava Jógvan sum yvirstýrimann.

Men sanniliga vóru tað eisini góðar løtur. Serliga minnist eg ein túr í Grønlandi. Hetta var mitt um summari og eg hevði konuna og bæði børnini við, og einhvør, sum kennir til hetta, veit, hvussu tað kann verða at hava børn við ein slíkan túr. Tá minnist eg serliga, hvussu góður Jógvan var við lítlu dóttir okkara og hekk hon eisini uppi í honum bæði tíðliga og seint; um hann ikki altíð hevði so góðar stundir, so tók hann sær tíð. Hann var sum ein klettur at hella seg til hjá vaksnum og børnum. Hann var so sera róligur í øllum førum. Fyri mær sá tað út sum um, at einki fekk hann av kós.

Vit sigldu eisini í Vest-Afrika og vóru tað trupulleikar av heilt øðrum slag enn teir í Grønlandi. Men í felag gekk tað eisini. Eg skal ikki útpenslað Jógvan í øllum einkultheitum, tí Jógvan var so nógv meir, enn tað sum eg veit um at siga. Hann hevði siglt nógv og var ein dyggur stuðul í øllum.

Eg veit at sorgin og saknurin nívir tukkum Kirstin og børnini og abbabørnini, men minnini kann eingin taka frá tykkum - minnir um ein góðan mann, pápa og abba. Latið tí tann líggja summarvindin turka tár tykkara og minnist alt tað, sum hann var góður við og metti høgt: alt, sum livir frá fjalli til fjøru og ta føroysku náttúruna, sum hann ofta nevndi sum eina av sínum vakrastu sjónum; har vildi hann hvíla millum fjalla, tá ið tíðin kom. Hon var nú komin hjá Jógvani. Hann hvílur nú í Harrans hondum millum fjalla!

*Um brimbroti breyt*
*Og sorlar mót´ kletti*
*Um logn var og tað ei um klettarnar dró*
*So var tú hin sami*
*Mong orð ei tú gretti*
*So stinnir ein kempa við róðrið tú stóð*

*Nú lendi hann deyðans eingil*
*Hann spyr ei um megi og mátt*
*Og Jógvan tú mátti nú fara*
*Nú hvílir tú æviga gott*

**Óli**

Bjarni Åkesson Filholm:

## Nordsøens hurtigløbere

**Bjarni Åkesson Filholm í Hjørring hevur á Forlaget Nautilus givið út nýggja bók við heitinum "Nordsøens hurtigløbere", sum er um DFDS-ferðamannaskipini Kronprinsesse Ingrid og Kronprins Frederik**



*Nýggja bókin "Nordsøens hurtigløbere"*



*Bjarni Åkesson Filholm*

FERÐAMANNASKIP

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Bókin "Nordsøens hurtigløbere" er enn eitt dømi um stóra áhugan fyri ferðamannaskipum hjá høvundanum, Bjarna Åkesson Filholm, sum er hálvur føroyingur og býr í Hjørring.

Hann hevur seinastu árini givið út fleiri bøkur um m.a. strandfaraskipið Smiril og ferðamannaskipini við navninum Tjaldur. Í fjør gav hann eisini givið út skaldsøguna "Lykkepust fra Liverpool", sum er 60-ara tónleikin á Bornholm.

Í nýggju bókini "Nordsøens hurtigløbere" verður eisini nógv skrivað um siglingina hjá Kronprins Frederik millum Esbjerg og Føroyar í 60-unum og 70-unum.

Í tíðindaskrivi frá Forlaget Nautilus stendur m.a.:

"De to flotte motorskibe Kronprins Frederik og Kronprinsesse Ingrid var gennem mange år indsat på DFDS's Nordsøruter fra Esbjerg til England. Med en servicefart på 20 knob blev overfartstiden bragt ned på 18 timer på Esbjerg-Harwich ruten, og skibene blev vidt kendt for deres høje komfort.



*DFDS- ferðamannaskipið Kronprins Frederik við bryggju í Havn við strandfaraskipinum "Sigmundur" liggjandi uttaná*

Begge skibe var bygget i Helsingør. Da de blev afleveret, var de DFDS's flagskibe og desuden det fornemste, som dansk skibsbygningsindustri kunne præstere.

De to skibe havde en spændende historie, hvor den mest dramatiske begivenhed var branden i Harwich, hvor Kronprins Frederik blev meget slemt beskadiget.

Bogen omhandler både de to skibes historie og en nøje beskrivelse af skibenes konstruktion. Bogen er rigt illustreret med mange spændende billeder af de to flotte DFDS-skibe, samtide brochurer m.m."

Bókin kann bíleggjast hjá føroysku bókahandlunum.